# BØNARLØTAN

APRÍL 2023 38. árg.

**1. Leygardagur** — *Josva 15.1-19*



*Jarðskjálvtaraktur býarpartur í Aleppo*

## TURKALAND, Istanbul
## Annika og Stephen Everett

Jarðskjálvtaraktu økini hava tørv á hjálp, bæði praktiska, sálarliga og andaliga, og samkomurnar her hjálpa væl. Vit vitja har eysturi fyrstu vikuna í apr. Ramadan endar 21. apr. Árliga stóra bønar- og evangeliseringstiltakið verður 23. apr. á oynni Büyük Ada út fyri Istanbul. Biðið, at Harrin opinberar seg gjøgnum dreymar.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**



Iransk kristin úr turkiskum samkomum hjálpa til í jarðskjálvtarakta økinum. Tey býta út mat og aðrar neyðsynjarvørur og skipa fyri spæli og tiltøkum fyri hart raktu børnunum.

**KRINGVARPIÐ**
2. apr. útvarpsmøti, Mizpa, Eiði
16. og 23. apr. sjónvarpsandakt, Meta av Fløtum
30. apr. sjónvarpsmøti, Elim, Søldarfjørður

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21.00: Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00: Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

***Pálmasunnudagur*** ***Jóh. 14.1-17***

**DANMARK, Kristnastova**
**Susan og Øssur Berghamar**



Vit eru takksom fyri áhaldandi samfelag og forbøn fyri verkinum í Kristnastovu og okkum við.
berghamar@kristnastova.dk

**– Sólva og Jákup Hansen**

***3. Mánadagur*** ***Josva 15.20-63***

**OM, LOGOS HOPE, DOULOS Hope, TeenStreet**
Eik Klæmintsdóttir og Esther Dam Hansen eru umborð á

Logos Hope í Sameindu Emirríkjunum. Ellintur Abrahamsen úr Fuglafirði fer umborð á Doulos Hope í Malaysia 5. apr. sum skipari næstu seks mánaðirnar.

**ZAREPTA**
Høvuðsreingerð 23. apr. til 3. mai. Lega fyri fólk við breki 5-7. mai.

## *4. Týsdagur* — *Jóh. 14.18-31*

**FØROYAR**
**Synnøve og Dánjal av Rana**
Nógv nýggj børn og barnafamiljur koma í sunnudagsskúla í Lívdini. Biðið, at tey trívast í samkomuni og vaksa í trúnni á Jesus, at mong melda seg til summartoymini hjá OM í summar og fyri fyrireikingunum til missiónsstevnuna fyrst í mai.

- **Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 13, Kristina 12**
- **Anna Maria og Rógvi Joensen**
- **Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 13, Ester 12, Samuel 8**



## *5. Mikudagur* — *Josva 16.1-10*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Pálmasunnudag og á páskum vitji eg samkomuna í Mangseng í Papua Ný Guinea, har Rachel og eg virkaðu saman við Julie og Sonna Poulsen 1986-1999. Gongdin hevur verið skiftandi í samkomuni seinnu árini. Biðið, at eg skilji støðu teirra.

## *Skírhósdagur* *Sálm. 74*

**INDONESIA, Papua**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 2, Selah Rose 0**

Selah Rose varð fødd 26. feb., vigaði knapt 8 pund og var 52 cm long. Vit fara til Papua í mai. Biðið, at Selah fær pass skjótt. Muslimska ramadanføstan endar 22. apr. Biðið, at vit eru góð vitnir fyri muslimsku vinir og grannar okkara.

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 11, Emma 6**



Samkoman hevur ymisk tiltøk um páskirnar at røkka út til bygdirnar her um leiðir. Biðið um, at Gud signar og dregur menniskju til Sín við evangeliinum.

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

## *Langi fríggjadagur* *Jóh. 15.1-27*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**



Møtir verða um páskirnar. Biðið fyri okkum og teimum, sum Harrin sendir til møtini.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 16, Emma Grace 15, Jónatan 13, Markus 11, Evita 8, Joy 6**

## *8. Leygardagur* — *Josva 17.1-18*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
STEVN heimasíðan er nærum klár. Vit fyrireika STEVN á urdu (ríkismálið í Pakistan) og enskum. Vit fyrireika eisini ferð til Pakistan frá juli til okt. Biðið fyri okkum og Joy, sum longu er í Pakistan.

*Í dag fyllir Ryan Jensen 14 ár

## *Páskadagur* — *Jóh. 16.1-15*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 9, Rio 3**



Shino heldur áfram at hava bíbliubólk og mammukafé. Biðið serliga fyri teimum, sum koma í bólkin. Ein teirra tykist at koma til trúgv.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 6**

## *2. páskadagur* *Josva 18.1-28*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 6, Jude 4, Evelyn 2**

Fyrstu mánaðirnir her hava gingið væl. Lili lærir málið, men tað er torført. Brian dugir málið frá uppvøkstrinum, so hann undirvísir ungum trúgvandi monnum á trúboðarastøðini. Biðið fyri okkum og serliga fyri unga Eliasi, ið nýliga er komin til trúgv.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 7, Natan 4**

## *11. Týsdagur* *Jóh. 16.16-33*

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Eg arbeiði við at bjóða tveimum deyvum úr hvørjum landi í Evropa til eina altjóða stevnu, sum verður á Kýpern 11-15. apríl. Stevnan snýr seg um at stovnseta deyvabíbliuumseting í øllum londum í Evropa, eisini Føroyum.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Vit savnast um Guds Orð á móðurmálinum. Biðið, at tað kveikir ung lesandi.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Mikudagur* *Josva 19.1-23*



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Eg undirvísi av og á í heimasamkomuni, samskifti við trúboðarar kring heimin, havi leiðslufundir á netinum o.a.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**

## *13. Hósdagur* *Sálm. 75 og 76*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



*Skurðurin er stórur, men arbeiðsmenninir eru fáir; biðið tí Harra skurðarins senda út arbeiðsmenn til skurð Sín! Luk.10.2.* Biðið, at Harrin sendir starvsfólk til legurnar í summar eins og manning til Juvel at sigla børnini. Eisini arbeiðsfólk í mai og juni at gera ymiskt neyðugt leguarbeiði og gera Juvel siglingarkláran.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Fríggjadagur* *Jóh. 17.1-26*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
**GRØNLAND, Nuuk**

Barnalega 29. juni – 6. juli, ungdómslega 7-13. juli. Í Nuuk verða Outreach 15-20. juli og familjulega 23 -30. juli. Tørvur: 5 leiðarar og 5 hjálparleiðarar. 2 + 2 í køki, matarhøll og uppvaski, 2 at vaska klæðir, wc og gólv, 1 til umsjón og eftirlit við jollum o.ø. Familjur við børnum eru eisini vælkomin at hjálpa. Ragnhild tel. 00299 486448 ella rj@malikseafood.gl

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Heilsustøðan hjá Daniel er ógreið, og honum tørvar grøðing. Biðið eisini, at Harrin styrkir vinir okkara í Qasigiannguit í trúnni.

## *15. Leygardagur* *Josva 19.24-51*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Vit vitja í Sorimi í apr. og mai saman við trimum sorimimonnum og umsetingarráðgevanum hjá NTM fyri at kanna tað, sum restar í umsetingini.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Sunnudagur* *Jóh. 18.1-23*

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Eg gangi til endurvenjingar av røddini eftir skurðviðgerð í raddarbondunum í jan. Vitjanartænastan liggur okkum á hjarta. Hevur tú eisini hug at vitja, so lat okkum vita. Takk fyri forbøn.

**Atlantic Mission, Juvel II**
Vit vitja samkomur og halda almenn evangelisk møti í Hetlandi 25. apríl til 7. mai við Juvel II. Kristilig smárit og innbjóðingar verða borin í húsini. Samkoman í Ebenezer í Lerwick skipar vitjanina.




**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 14, Terji 10, Petra 9**



## *17. Mánadagur* *Josva 20.1-9*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Fólk leggjast aftrat samkomuni hvørja viku. Alneyðugt er at byrja uppíbygging, og serlig gáva ger tað møguligt at seta stálkonstruktión og tak upp. Vónandi halda vit møtir her um eitt ár.

## *18. Týsdagur* *Jóh. 18.24-40*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 9, Micah 9**

Samkoman fylti 8 ár í mars. Biðið, at Harrin leiðir fleiri til trúgv her.

## *19. Mikudagur* *Josva 21.1-26*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**



Í løtuni eru seks sjálvboðin frá Mamelodi, ið hjálpa til í tænastuni við børnum og rúsmisnýtarum. Hetta er minsta toymið, vit leingi hava havt. Fleiri teirra eru ung, ið eisini hugsa um hægri lesnað ella arbeiði, og tí er toymið óstøðugt. *Biðið tí Harra skurðarins senda út arbeiðsmenn til skurð Sín! Matt. 9:38.*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Mamma gentu, ið hevur verið við Ástjørn, hevur lisið Nýggja Testamenti hvønn dag síðani síðsta summar. *Orð Guds er livandi og hevur kraft. (Hebr. 4:12).*

## *20. Hósdagur* — *Sálm. 77*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 5, Timon 3**



Vit fyrireika ferðina til kovolfólkið og starvsfelagar okkara har. Biðið, at Harrin signar okkum og arbeiðið, ið liggur fyri framman.

## *21. Fríggjadagur* — *Jóh. 21.1-14*

**FØROYAR**
**Else og Poul Johan Djurhuus**

Takk fyri stuðul og forbøn. Poul Jóhan fer við Juvel II til Hetlands á evangeliseringsferð frá 25. apr. til 7. mai. Svenning av Lofti, Jógvan Páll Sevdal, Poul Johan Djurhuus og Páll á Lakjuni skipa fyri.

## *22. Leygardagur* — *Josva 22.1-20*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 11**

Stórur tørvur er á heimalærarum til komandi skúlaár til trúboðarafamiljur okkara, serliga í PNG. Biðið fyri hesum.

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**



Vit vitja í Føroyum 25. apr. Til 15. mai og vitja fegin samkomur hesa tíðina. Heðin Poulsen, bróðir Dorit, samskipar skránna: hedinp@gmail.com.

## *23. Sunnudagur* — *Jóh. 21.15-25*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Vit vitja familju hjá Annu í Danmark. Vit siga frá Guds verki í Senegal, á Malta 23. apr. og í Glostrup Frikirke 30. apr. Augustin og Samira í Senegal giftust herfyri. Umsetingartoymið fyrireikar saman við honum útgávu av 1. og 2. Mós. og øllum NT í einari útgávu.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Samkoman í La Fonte hevur fleiri avbjóðingar. Biðið, at Harrin reisir upp fólk, sum kunnu gerast partur í hirðatænastuni.

## *24. Mánadagur* — *Josva 22.1-20*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 9, Judah 7, Ethan 5**

Biðið, at skjøl og heilsuviðgerðir, eitt nú til Noah, verða í lagi, áðrenn vit fara aftur til PNG, og at vit møguliga eisini

kunnu vitja Ongland og Føroyar. Biðið, at vit kunnu stimbra mengensamkomuna og útvega teimum lærutilfar. Sí eisini: https://www.facebook.com/groups/juiceandsqueeze

## *Flaggdagur* *2. Pæt. 1.1-21*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Brúdleypið hjá unga trúgvandi manninum gekk væl. Mótstøðufólk hansara royndu til síðstu løtu at forða fyri brúdleypinum, men tey blivu gjørd til skammar. Biðið, at Harrin varðveitir nýgifta parið. Matteusarevangeliið er nú prentað og býtt út. Eg haldi áfram at rættlesa Nýggja Testamenti.

*Í dag fyllir Markus Tuohy 11 ár

## *26. Mikudagur* *Josva 22.21-34*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 12, Leah 9, Abigail 4**
Nógv ung og vaksin koma til møtir, og fleiri teirra ynskja at tæna í samkomuni. Vit hava ein barnaklubba í grannalagnum, har vit kunngera Jesus. Cécile fyrireikar Louan, eina kvinnu, til at verða doypt 28. mai. Jóhannis hevur steðg frá parti av samkomuarbeiðnum nú í nakrar mánaðir.

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 14**
Politiska støðan millum stjórnina og andstøðuna í Senegal

er sera spent. Politiskar orðingar elva til harðskap, ófrið og samanbrestir. Vit hava tað øll gott, men minnist okkum, so at vit kenna Harrans frið.

## *27. Hósdagur* — *Sálm. 78.1-31*

**Stuðulsferð til Bahamaoyggjar.**
Ódnarveður í 2020 rakti Bahamaoyggjar meint. Korona forðaði, at vit kundu vitja tá, men nú verður farið við hjálpini, ið føroyingar hava veitt. Tom Roberts og onnur frá meint raktu oyggjunum hava hjálpt at leggja ferðina til rættis 1-15. mai. Nærri kunning frá Siggu og Ragnar Sundstein 758110 og Rutt og Jóhannus Olsen 217060.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Fríggjadagur* — *2. Pæt. 2.1-22*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 14**
Monika hjálpir døtrunum at falla til í Føroyum, meðan Tim ferðast nógv til Filipsoyggjar í tænastuni. Tey søkja um familjusamanføring, men avbjóðingar eru í hesum sambandi mótvegis Udlændingestyrelsen.

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

## *29. Leygardagur* *Josva 23.1-16*

**FØROYAR**
**Synnøve og Dánjal av Rana**

Nógv nýggj børn og barnafamiljur koma í sunnudagsskúla í Lívdini. Biðið, at tey trívast og vaksa í trúnni, at mong melda seg til summartoymini hjá OM og fyri fyrireikingunum til missiónsstevnuna fyrst í mai.

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 11, Noah Kristian 9**

Vit taka farloyvi seinni í ár fyri at vera í Hollandi, har dreingirnar fara í skúla. Øll familjan vitjar í Føroyum í summar, og Sørin fer at vitja samkomur seinni í ár.

## *30. Sunnudagur* *2. Pæt. 3.1-18*

*Í dag fyllir Rebekka Sharp 18 ár

Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo
NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## NÝGGJ BÓK!

**Ókeypis 32 síður**

Poul Jóhan Djurhuus hevur givið út bókling við vitnisburðinum hjá Gerhardi Hansen. 32 síður við myndum og myndateksti í 2000 eintøkum. Ætlanin er at vitja samkomurnar at vísa bóklingin fram og leggja hann í samkomurnar. Bóklingurin kann nýtast sum gáva, har ein kennir, tað er hóskandi.




**Les bókina á netinum:**

Gerhard Hansen: Vitnisburður og brot úr lívssøgu míni:
pubhtml5.com/gngy/idta/Gerhard_Hansen%3A_
Vitnisburður_og_brot_úr_lívssøgu_míni

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo